## Flotin minkaði í før

Á nýggjárinum vóru 1.529 fiskifør skrásett í íslendsku skipaskrásetingini ella 113 færri enn fyri einum góðum ári síðani. Hagstovan sigur, at um ársskiftið vóru skrásett 769 motorskip, sum vóru 86.390 bruttotons tilsamans. Sostatt fækkaðu motorskipini 65 í fjør. Íslendingar høvdu 60 trolarar nú á nýggjárinum ella fýra færri enn næstseinasta nýggjár. Bruttotonsatalið í trolaraflotanum var 69.889, og tað var næstan 4.200 minni enn fyri einum ári síðani.. Teir opnu fiskibátarnir vóru 700 í tali nú um ársskiftið, og tað var 44 færri enn eitt ár frammanundan.




## Fýra bøkur við róðri

Ein nýggj røð av bókum við snarihjóli er júst komin til smáu lesararnar. Børnini fara við Lítla traktori og Lítla lastbili til arbeiðis. Í bókini Lítli útróðrarbátur fylgja børnini útróðrarbátinum, tá hann fer at fiska. Við Lítla sløkkibili skulu tey uttan kort finna leiðina til Óla bónda, tí har er eldur í. Bøkurnar hava hjól ella róður, sum børnini kunnu snara og soleiðis hjálpa akførunum at finna leiðina. Bókadeildin gevur út nýggju bókarøðina, sum Niels Jákup Thomsen hevur týtt til føroyskt.

## Country- og gospel-konsert í Suðuroynni

**Leygarkvøldið 18. apríl verður høllin í Trongisvági karmur um stóra konsert við Halli Joensen, Alex Bærendsen og Kristinu Bærendsen og góðum tónleikarum**

KONSERT
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Alex Bærendsen hevði óivað verið millum teir fyrstu, ið sluppu innar, um vit í Føroyum høvdu Hall of Fame innan countrytónleik, tí hann er ein av undangongumonnunum, og ein av kendastu og best dámdu sangarum í landinum. Alex fer á pallinum í Trongisvági 18. apríl at syngja fleiri av væl kendu sangunum, ið hann hevur givið út, og sum javnan eru at hoyra í loftmiðlunum.

Tað eru eini 20 ár síðani, at Alex Bærendsen var á palli í Suðuroynni, og við honum, nú hann fer á pall í Trongisvági, er dótturin Kristina Bærendsen.

Eisini fer Hallur Joensen á pall, og hann er ikki bara ovast á tindunum í Føroyum, men verður eisini spældur kring í Europa og aðrastaðni við.

Tað eru VILT, ið skipar fyri konsertini, men fleiri góðir stuðlar hava gjørt konsertina gjørliga. Yvirskotið av konsertini fer til vælgerðandi endamál, ið koma børnum til góða.

Atgongumerki eru at fáa á Statoil á Tvøroyri og Shell í Vági.

# Nevndarlimir i Eik Grunninum kunnu hefta persónliga

**Um nakað óregluligt fór fram, tá Eik Grunnurin keypti partabrøv frá Eik Banka í fjør, kann nevndin i grunninum í ringasta føri hefta persónliga fyri tapið**

EIK
*Leif Láadal*
*leif@sosialurin.fo*

Um nakað óregluligt fór fram, tá Eik Grunnurin keypti Spron-partabrøv og brøv í Investia frá Eik Banka í fjør, kunnu nevndarlimirnir i Eik-grunninum í ringasta føri hefta persónliga fyri tapini.

Tað sigur Kristin Balle frá Skrásetingini, uttan tó at gera viðmerkingar til ítøkiliga málið við Eik Grunninum.

-Er tað so, at nakað óregluligt er farið fram i sambandi við arbeiðið hjá einum vinnurekandi grunni, sum skal virka eftir ásetingunum hjá grunninum, so kunnu nevndarlimir og leiðsla hefta persónliga fyri tapi, sambært kapitul 8 í lógini, sigur Kristin Balle.

Og er talan um ein vinnurekandi grunn, so sigur tað seg sjálvt, at hann skal virka fyri at fáa so nógv sum gjørligt burturúr fíggjarliga, leggur hon afturat.

Og tað er júst tað, sum nú skal kannast. Skráseting Føroya, sum yvirtók eftirlitið við grunnum í Føroyum 1.januar 2008, hevur biðið Eik Grunnin um eina frágreiðing i sambandi við nakrar handlar av partabrøvum, sum vórðu keypt frá Eik Banka.




*Eik-grunnurin skal altíð arbeiða í sínum egna áhuga, og tí kann tað henda, at nevndarlimirnir persónliga skulu hefta, um óreglusemi er farið fram í Eik*

Danskir miðlar hava seinastu dagarnar róð uppundir, at hesir handlar eru framdir fyri yvirkurs, sum so hevur ávirkað ársroknskapin hjá Eik Banka jaliga. Nevndin í grunninum hevur ikki fingið nakra freist frá Skrásetingini til at svara, men Kristin Balle væntar svar um nakrar vikur, sigur hon.

### Nýtt økið

Málið um kanningna av Eik Grunninum er tað fyrsta av sínum slag, síðani Skráseting Føroya yvirtók eftirlitsmyndugleikan. Kristi Balle sigur, at sjálvt í Danmark hava tey ikki so nógv mal av hesum slag, tó at har eru nøkur, sum Skráseting Føroya eisini fer at skeita eftir i sambndi við viðgerðina av føroyska malinum.

# Ungir blásarar hertaka Norðurlandahúsið

**Týskvøldið 10. mars klokan 19 verður konsert í Norðurlandahúsinum, við stórum blásiorkestri úr Tórshavnar Musikkskúla**

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Skráin er fjølbroytt, nevnast kunnu, syrpa við løgum hjá Count Basie, føroyskt lag eftir Trónd Bogason og kenda verkið Nimrod eftir Edvard Elgar.

Konsertin er endin av verkskeiði, sum hevur til endamáls at samansjóða blásiljóðføris næmingar, sum hava góðan førleika á sínum ljóðføri, í eitt felags orkestur.

Fyri menningina av tónleikanæmingum hevur orkesturspæl stóran týdning. Tí hava tónleikalærarar, ið varða av blásitónleikafrálæruni í Tórshavnar Musikkskúla, tikið stig til hettar tiltakið, ið vendir sær til ungar tónleikarar sum fáa undirvísing í musikkskúlanum.

Næmingarnir, ið eru bodnir við til orkesturverkskeiðið, eru ávegiskomnir, tvs hava spælt upp á blásiljóðføri í nøkur ár. Harafturat eru miðnámsnæmingar Tórshavnar Musikkskúla eisini við.

Hesir næmingar fáa undirvísing, ið fyrireikar teir til víðari lestur innan tónleikaøkið, og mugu tí sigast at vera framtíðar yrkistónleikarar okkara her á landi.

Lærarahópurin, ið hevur staðið fyri verkskeiðnum, er mannaður við lærarum úr fakbólkinum, ið varðar av blásitónleikinum í Tórshavnar Musikkskúla.

Tey eru: Andrea Heindriksdóttir, Annika Højgaard, Atli K Petersen, Bernharður Wilkinson, Bjarni Berg, Christina Andersen, Eirikur Skála, Jens Knudsen, Katja Volovelskaja, Kenneth Jones, Oddur Hentze, Ólavur Olsen og Peder Riis-Jensen.



*Konsert týskvøldið 10. mars kl. 19:00. Í sambandi við orkesturdagar 9. og 10. mars í Norðurlandahúsinum*

Bernharður Wilkinson stjórnar orkestrinum.

Á konsertini luttekur eisini orkestrið »Blásitokið«, sum er orkestur mannað við yngstu blásinæmingum úr Tórshavnar Musikkskúla. Harumframt fara blásilærarar sum starvast í Tórshavnar Musikkskúla eisini at framføra.